# SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ

# ÁRSFRÁGREIÐING 2008

Nevndin setti sær fyri at arbeiða víðari við málunum, sum vóru ásett fyri árið 2007.

1. **Menning av kompetensunum hjá limunum í ráðnum**
2. **Dagføring og viðtøka av sjúkrarøktaretiskum leiðreglunum**
3. **At gera etiska ráðið meira sjónligt millum limirnar í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**
4. **Fylgja við í kjakinum um trygdina av persónsupplýsingum í samband við innføring av Talgildu Heilsuskipanini í Heilsuverkinum**

**Ad. 1 Menning av kompetensunum hjá limunum í ráðnum.**

Á regluligu fundunum hava limirnir greinað og viðgjørt etiskar tvístøður, sum limirnir sjálvir hava upplivað ella lisið í fakligum tíðarritum. Hetta hevur verið gjørt fyri at menna kompetensuna hjá limunum at viðgera tvístøður.

Flest øll fakfeløg í norðurlondum hava sjúkrarøktarfaklig etisk ráð. Hesi hava nú í 3 ár fyrireikað og hildið ráðstevnur um sjúkrarøktaretikk, skift ímillum tey ymisku londini. Í ár høvdu vit í Føroyum æruna av at fyriskipa hana. Hon var hildin á Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya í døgunum 26. og 27. sept.

Tvey høvuðsevni vóru á skránni:

1. Arbeiðið í teim ymisku etisku ráðunum.

- hvørjir líkskapir og munir eru og hvat gagn kunnu vit fáa av royndunum hjá hvørjum øðrum? Forkvinnurnar løgdu fram.

2. Terminologi og hvussu ávirkast málið?

- terminologi og leksikografi. Mál og samfelag, identitetur, normar. Mál er meira enn eitt miðlaamboð. Tala sum sosial interaktión. Faktorar, sum hava týdning fyri hví málið broytist. Jógvan í Lon Jacobsen adjunktur á Fróðskaparsetri Føroya helt fyrilestur.

Ráðstevnan var skipað við uppleggi, fyrilestri og fyri ein stóran part við orðaskifti í arbeiðsbólkum og felags samanumtøku. Sjúkrarøktarfrøðiskúlin stuðlaði ráðstevnuni peningarliga við at lata høli ókeypis og við at gjalda løn til praktiska hjálp og til fyrilesaran. Sjúkrarøktaretiska ráðið takkar fyri stuðulin. Komandi ráðstevnan um etikk innan sjúkrarøktina verður hildin í Stockholmi í sept.

**SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ**

**ÁRSFRÁGREIÐING 2008**

**Ad. 2 Dagføring og viðtøka av sjúkrarøktaretisku leiðreglunum**

Fyrst í árinum var arbeiðið við at dagføra etisku leiðreglurnar úr hondum greitt. Tær vóru lagdar fyri aðalfundin til støðutakan. Limirnir eru kunnaðir um broyttu leiðreglurnar á fundum kring landið í 2007 og tær eru eisini prentaðar í Vøku. Tess vegna var bert ein stutt kunning á aðalfundinum frammanundan atkvøðugreiðsluni. Eingin viðmerking var førd fram á aðalfundinum og leiðreglurnar vóru viðtiknar við ongum mótmæli.

Limir í etiska ráðnum Sigrun og Hildur vóru orðstýrarar, tá ið SSN hevði árliga ráðstevnu, hildin á hotel Føroyum. Etikkur var høvuðsyvirskrift og í tí sambandi eru føroysku sjúkrarøktaretisku leiðreglurnar umsettar til enskst, so til ber hjá øllum limunum í fakfeløgunum at kunna seg um innihaldið í teimum.

**3. Gera sjúkrarøktaretiska ráðið meira sjónligt millum limirnar**

Limirnir í Sjúkrarøktaretiska ráðnum meta framvegis, at ráðið verður ov lítið brúkt, bæði av nevndini í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og av limunum yvirhøvur. T.d. hevur etiska ráðið heldur ikki seinasta árið fingið uppskot til lógir og reglugerðir til hoyringar.

Ráðið kann tó eisini taka mál til viðgerðar av sínum eintingum. Vísandi til tað, hevur ráðið tikið mál um flytan av fakmørkum til umrøðu. Í sambandi við, at álit um framtíðar sjúkrahúsverk er skrivað, hevði Hans Pauli Strøm almanna og heilsumálaráðharri grein í fjølmiðlunum um, at tað fór at vera neyðugt og kanska eisini ein fyrimunur fyri sjúkrahúsini, at sjúkrarøktarfrøðingar skulu yvirtaka funktiónir frá læknunum og heilsurøktarar skulu yvir taka funktiónir frá sjúkrarøktarfrøðingum. Hetta sjónarmið var ikki bara sett í fakligt, men eisini í fíggjarligt samanhang. Sigrun Wardum limur í sjúkrarøktaretiska ráðnum skrivar grein til fjølmiðlarnar, sum viðger málið úr ymiskum sjónarhornum. Greinin er ætlað, sum eitt ískoyti til kjak um málið. Aftaná reaktión í dagbløðunum frá forkvinnuni í fakfelagnum hjá heilsurøktarum, heitir Kringvarpið á Sigrun um at taka lut í kjaki í tilknýti til Dag og Viku. Reaktiónirnar frá fólki aftaná kjakið hava verið jaligar og benda á, at saklig argument eru vælkomin og víðkar fatanina av sjúkrarøktini hjá hyggjarum og áhoyrarum. Sum ein partur av at sjónliggera sjrúkrarøktaretiska ráðið er frágreiðing frá norðurlendsku ráðstevnuni um etikk skrivað og løgd á heimasíðu felagsins.

# SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ

# ÁRSFRÁGREIÐING 2008

**4. Fylgja við í kjakinum um trygdina av persónsupplýsingum í samband við innføring av THS (Talgildu Heilsuskipanini í heilsuverkinum)**

Hetta er eitt øki, sum Sjúkrarøktaretiska ráðið ikki hevur gjørt stórvegis við seinasta árið. Sigrun hevur verið við á fundum í stýrisbólkinum fyri skjalfesting av sjúkrarøkt, har Jóannes Erik Køtlum greiddi frá teknisku viðurskiftunum kring tagnarskyldu í sambandi við Cosmic og sjónarmiðnum hjá Almanna og heilsumálaráðnum hesum viðvíkjandi.

Tað sentrala punktið er, at jú fleiri og hægri skott eru millum ymisku økini, jú tyngri verður at arbeiða. Tað vil siga, at við totalum skotti hvørvur tað geniala í skipanini, nevniliga, at heilsustarvsfólk, sum t.d. eru um ein nýinnlagdan akuttan sjúkling, kunna heinta upplýsingar, sum eru viðkomandi fyri støðuna frá t.d. kommunulækna ella aðrari sjúkrahúsdeild.

Talgilda heilsuskipanin verður nú sett í verk á skurðdeplinum á Landssjúkrahúsinum, sum ein byrjan. Sigrun er ikki longur við á fundum, men tað forðar ikki etiska ráðnum at fylgja við í menningini av skipanini, tó við størri fjarstøðu enn nú.

**Nevndarlimir til Sjúkrarøktaretiska ráðið**

Valskeiðið hjá limunum sær nú soleiðis út. Sigrun Wardum endurvald 2007 til 2011. Jana Mortensen 2005 til 2009 Jana ætlar ikki at halda áfram í ráðnum vegna broyttar arbeiðsumstøður og tí er neyðugt, at ráðið fær ein annan lim í hennara stað. Súsanna Olsen og Maiken Olsen 2007 til 2011. Hildur við Høgadalsá 2006 til 2010.

## Innkomin mál

Ráðið hevur fingið eitt mál til viðgerðar og er spurt, í samband við sjónvarpslýsing, um tað er etiskt forsvarligt at seta eld á eitt annað menniskja fyri at reklamera fyri sær sjálvum?

Ráðið hevur millum annað svarað

Okkara fatan er, at sjónvarpið sum fjølmiðil er væl valt, tí sjónvarpið er eitt tilfeingi, sum er lætt atkomuligt og kann brúkast til nógv ymisk endamál. Ein lýsing sum er send í tøttum tilknýti til sendingina Dagur og Vika røkkur longst, tí flest allir føroyingar hyggja eftir sendingini.

Lýsingin sjálv hevur givið nógvar reaktiónir imillum limirnar og almenningin sum heild. Ein kann seta sær spurningin um tað orðaskiftið hevur verið gevandi og mennandi fyri felagið, bæði tá ið tað snýr seg um nevnd og limir? Ein kann eisini seta sær spurningin, um lýsingin sjálv líkist frá

ymiskum almennum hættum at mynda ein boðskap og harímillum um livandi myndirnar í lýsingini líkjast myndunum, sum longu frammanundan eru til í t.d. sjónvarpsspølum? Ein annar spurningur er so, um lýsingin nøktar boðskapin at gera vart við fakið sjúkrarøkarfrøði og lýsa hugburðin hjá sjúkrarøktarfrøðingum til sjálvt fakið?

**Etisk tvístøða?**

Okkara fatan av málinum er, at talan er ikki um eina etiska tvístøðu, men heldur um ein etiskan spurning. Grundgevingin fyri teirri áskoðan er, at ikki ber til at velja eina loysn framum aðra tvs. at velja ta betru av tveimum illum.

Hvussu man boðskapurin kunna skiljast í síni heild? Eingin kann misskilja, at tað snýr seg um sjúkrarøktarfrøðingar, sum eru í tøttum samspæli og sum inspirera hvønn annan.
Hinvegin kunna vit spyrja, hvørjar myndir eru hóskandi amboð at nýta til at vekja ans og áhuga í dagsins samfelag? Kanska serliga ímillum ungdóm, har nøkur vónandi vera framtíðarinnar sjúkrarøktarfrøðingar, og sum tískil munnu vera fremsti málbólkurin fyri lýsingina?

Ein kann seta spurningin um lýsingin beinleiðis særir fólk og skúgvar tey frá sær, og at vit soleiðis kunnu siga hana at vera beinleiðis etiskt óforsvarliga? Spurningurin man heldur vera, um livandi myndin ræðir smá børn, sum eru konkret hugsandi? Um so er, er kanska gott, at lýsingin júst er send beinleiðis í sambandi við sendingina Dagur og Vika, tí tá kunnu vaksin fólk greiða børnunum frá rætta samanhanginum.

**Niðurstøða:**

Málið reisir møguliga fleiri spurningar heldur enn at geva endalig svar. Niðurstøðan má tó vera, at lýsingin neyvan er best hóskandi grundarlagið undir at gera vart við fakið, hóast hon hevur vakt ans ímillum almenningin og limirnar og hevur ført við sær, at fakið hevur fingið nógva umrøðu.
Tað letur seg ikki gera at kalla hana óetiska, men heldur lítið klóka, av tí at hon bæði verður sædd sum provokerandi og ræðandi fyri summi.